# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Hvussu ber tað til, at eingin hevur sæð ella hoyrt nakað, og at eingin hevur spurt um nakað*
*(eysturríkska blaðið Standard)*

# Eg vildi bara verja hana ímóti rúsevnum



*Í hesum rúmunum sat Elisabeth sum fangi og misbrúkt í samfull 24 ár*
*Mynd: Polfoto*



*Josef Fritzl: -Eg vildi bara verja Elisabeth ímóti rúsevnum*
*Mynd: Polfoto*

**- Elisabeth var strævin sum ung, og eg vildi bara verja hana ímóti rúsevnum, sum sigur Josef Fritzl, sum misbrúkti dóttir sína í 24 ár og fekk sjey børn við henni**

Tann 73 ára gamli Josef Fritzl heldur eftir øllum at døma ikki, at hann hevur gjørt nakað skeivt. Í hvussu er hevði hann eina frágreiðing, tá eysturríkska løgreglan spurdi, hví hann gjørdi av at steingja dóttir sína inni í kjallaranum, tá hon fylti 18.

- Hon var strævin sum ung, og eg gjørdi av at verja hana ímóti rúsevnum, svaraði Josef Fritzl.

Í gjárkvøldið bleiv hann settur í varðhald, skuldsettur fyri at hava havt sína egnu óttir innistongda í samfull 24 ár, fyri at hava misbrúkt hana kynsliga og fyri at hava fingið sjey børn við henni.

- Hann var púra róligur, og tað var einki, sum vísti, at hann iðraði seg um nakað, segði leiðarin í fongslinum, sum Josef Fritzl nú er í. Kortini er vaktarhaldið ógvuliga strangt, tí leiðslan í fongslinum bera ótta fyri, at hinir fangarnir kunnu gera seg inn á hann.

### Royndi at flýggja

Eitt blað í Eysturríki skrivar í dag, at sum ung royndi Elisabeth tvær ferðir at flýggja frá foreldrunum.

Undir avhoyringunum hevur hon sagt løgregluni, at tann kynsliga misnýtslan byrjaði, longu tá hon var 11 ára gomul. Fimm ár seinni royndi hon at flýggja, men pápin fann hana og tók hana við sær aftur til hús.

Tá hon var 18, gjørdi hon aftur eina roynd at sleppa burtur frá foreldrunum. Men eisini hesaferð fann pápin hana, og hesaferð revsaði hann hana við at læsa hana inni í kjallaranum, har hon sat tey næstu 24 árini.

### Hoyrdi Elisabeth

Eysturríkska blaðið, sum skrivar, at Elisabeth royndi at flýggja frá foreldrunum veit eisini at siga, at gentan rópti eftir hjálp, og at hon dukaði á veggirnar í kjallaranum, uttan at nakar hoyrdi hana. Heldur ikki mamman, sum búði í somu húsum.

Men ein maður, sum leigaði eitt kamar frá Josef Fritzl í nítiárunum, helt seg hoyra okkurt. Hann sigur við eysturríkska blaðið, at hann hoyrdi barnagrát, men at hann helt tað vera okkurt barn hjá grannunum, sum græt.

- Ta einu ferðina helt eg meg eisini hoyra okkurt ljóð frá onkrum, sum flutti seg, men eg helt tað vera eina mús, sigur maðurin við blaðið.

## Ræðusøgan hjá Elisabeth

**Tað, sum tann 42 ára gamla Elisabeth hevur sagt eysturríksku løgregluni, er ein skelkandi ræðusøga:**

Pápin hevur misbrúkt hana kynsliga, síðani hon var 11 ára gomul.

Tá hon í august í 1984 fylti 18, lumpaði pápin hana niður í kjallaran, har hann gav henni doyvandi evni og legði hana í hondjørn.

Pápin segði konuni, vinum og grannum, at Elisabeth var rýmd, og at hon livdi saman við einari sekt.

Tey næstu 24 árini misbrúkti pápin hana javnan, og eftir øllum at døma varnaðist mamman einki. Kjallarin bleiv støðugt útog umbygdur við fleiri rúmum, teirra millum einum bjálvaðum kliva, sum var 1,70 metur høgur millum loft og gólv.

Í 1989 fekk Elisabeth tað fyrsta barnið við pápanum.

Í 1990 fær Elisabeth ein son. Í síðstu viku sá hann fyri fyrstu ferð dagsins ljós.

Í 1992 fær hon eina dóttir. Gentan verður løgd á trappusteinin hjá foreldrunum og er vaksin upp hjá pápanum. Í 1994 fær hon aftur eina gentu. Eisini hon veksur upp saman við pápanum.

Í 1996 fær Elisabeth tvíburar, tveir dreingir, men annar doyr, og pápin brennur líkið. Hin veksur upp saman við pápanum.

Í 2002 fær Elisabeth afturt ein drong, sum veksur upp í kjallaranum saman við mammuni. Eftir at læknarnir ígjøgnum fjølmiðlarnar bóðu Elisabeth gera vart við seg, fór hon á sjúkrahúsið, har hon greiddi frá, at hon júst var flýdd úr kjallaranum.

Tann 28. apríl verður Josef F. varðhaldsfongslaður. Undir avhoyring greiðir hann løgregluni frá tí loyniliga kjallaranum og letur løgregluna fáa koduna til kjallarahurðina. Hann viðgongur kynsliga misnýtrslu, og at hann eigur børnini hjá Elisabeth.

Elisabeth verður eisini avhoyrd, eftir at hon hevur fingið vissu fyri, at henni nýtist ikki at síggja pápan aftur. Elisabeth sær út til at vera tjúgu ár eldri, enn hon veruliga er.

**STUTT SAGT**

## Skúlabørn mintust Saddam



*Saddam Hussein hevði fylt 71 í gjár, var hann á lívi*
*(Mynd: Polfoto)*

Fleiri hundrað skúlagentur komu í gjár saman við gravstaðin hjá fyrrverandi irakska forsetanum Saddam Hussein, sum hevði fylt 71, var hann á lívi. Saddam var føddur í býnum Awja tann 28. apríl í 1937, og hóast hann er hataður víða um í heimlandinum og aðrastaðni, er hann framvegis nógv avhildin í landspartinum Salahuddin, haðani hann var ættaður. Skúlagenturnar, sum savnaðust við gravstað hansara í gjár, bóru eitt stórt skelti við orðunum „Vit fara ikki at gloyma teg, Saddam faðir". Tær flestu kystu gravstaðin og bóðu ilt yvir USA og George W. Bush, forseta. Ein av teimum, sum høvdu fyrireikað tiltakið í gjár, segði við tíðindafólk, at tiltakið skuldi minna irakar á tann frið, sum valdaði, tá Saddam ráddi fyri borgum.

- Børnini, sum vuksu upp, meðan hann sat við ræðið, kendu seg trygg. Tey kendu einki til dráp og harðskap, segði Faten Abdel Qader við tíðindafólkini.

## Tynnist hjá Sarkozy

Tað gongst illa hjá franska forsetanum at varðveita ta góðu undirtøkuna, sum hann hevði millum fronsku veljararnar, tá hann bleiv valdur. Tvørturímóti er undirtøkan hjá Nicolas Sarkozy minkað nógv teir seinastu mánaðarnar, og nú vísir ein nýggj kanning, at bara 32 prosent av teimum spurdu eru nøgd við forsetan og tað, sum hann avrikar. Heili 64 prosent halda, at hann fær ov lítið burturúr, og so lítla undirtøku hevur eingin franskur forseti havt líka síðani 1981, skrivar AFP.